

# Hugsa um ljóð tá tú by

**Tá fólk seta búgv, er týdningarmikið at geva sær far um ljóðviðurskiftini í nýggja heiminum. Sum heild hugsa sethúsabyggjarar ov lítið um at doyva ljóðið, so tað gerst liviligari fyri alla familjuna, sigur ljóðserfrøðingurin, Johannes Steingrund**

Óbevíst hava ljóðviðurskifti stóra ávirkan á, hvussu trivnaðurin er í einum heimi. Men tá samanum kemur, hvussu nógvir privatir sethúsabyggjarar munnu gera sær stórvegis tankar um, hvussu tey ymsu rúmini í húsinum verða plaseraði í mun til hvørt annað, so størst møgulig atlit verða tikin fyri óljóði og gangi í tí nýggja heiminum? Helst er tað rættiliga ivasamt.

Tann føroyingurin, sum uttan hevur størstu royndirnar á hesum øki, er Johannes Steingrund í Saltangará. Líka síðani tíðina sum tannáringur hevur hann fingist við ljóð á ymsan hátt. Tey fyrstu árini sum tónleikari, seinni útvarpsteknikari og síðani sum sivilverkfrøðingur við serkunnleika í akustikki ella ljóðviðurskiftum. Harafturat hevur Johannes Steingrund minst 25 ára royndir handan miksipultin hjá bæði kendum og minni kendum tónleikarum og tónleikabólkum.

Líka síðani Johannes Steingrund varð liðugur sum sivilverkfrøðingur á Danmarks Tekniske Universitet í Lyngby, hevur hann arbeitt fyri mikron- og ljóðmátarafyritøkuna, Brüel & Kjær. Bæði í Danmark og Týsklandi. Tey seinnu árini hevur hann verið leysari knýttur at fyritøkuni, tí uppgávurnar viðvíkjandi ráðgeving í Føroyum eru vaksandi. Serliga í sambandi við nógvar størri og smærri byggiverkætlanir, har ráðgevandi verkfrøðingar, arktiktar og byggiharrar vilja hava ljóðviðurskiftini so góð sum tilber; alt eftir hvat tann ávísi bygningurin skal nýtast til. Eisini nógvir privatir húsabyggjarar hava konsulterað ljóðmannin í Saltangará, áðrenn teir eru farnir í gongd við at byggja ella umbyggja.

## Trý atlit at taka

Sambært Johannes Steingrund eru tað í høvuðsheitum trý atlit, ið skulu takast í sambandi við sethúsa- og íbúðarbygging í sambandi við ljóð.

Tað fyrsta er, hvussu langur eftirklangurin er, tað næsta hvussu rúmini verða løgd í mun til hvørt annað, og tað triðja er, um fleiri familjur búgva í sama húsi ella á sama matrikuli. Til dømis í kjallara- og ella loftsíbúð ella tá talan er um tvíhús.

Jú, harðari veggir, loft og gólv eru, jú størri ella kraftigari verður eftirklangurin og kemur harvið at streingja tey, sum eru í rúmi saman, meiri enn neyðugt. Hetta umfatar alt ljóð í rúminum; tónleik, tos, spæl, barnagrát ella annað. Um hædd verður tikin fyri ljóðviðurskiftum, tá eitt rúm verður innrættað, so gerst ljóðið munandi minni belastandi fyri øll húsfólkini.

Tað er ein royndur lutur, at áhaldandi óljóð og larmur ávirkar hoyrnina og psykuna hjá hvørjum einstøkum. Tí snýr tað seg um at stytta